## Kunnu flyta fram til grækarismessu

Starvsnevndin hjá FSF hevur avgjørt at útseta afturlatingardagin fyri flytingargluggan. Orsaka av at starvsnevndin arbeiddi við broytingum í reglugerðini fyri áhugaleikarar var ætlaða upplatingin av flytingarglugganum í november útsett til 30. januar. Ætlandi skuldi fytingargluggin lata aftur komandi hóskvøld, 19. februar 2009, men á fundi í starvsnevnd FSF's hósdagin varð avgjørt at útseta afturlatingina av flytingarglugganum, so at møguleiki verður hjá leikarum at skifta felag fram til og við Grækarismessu, hósdagin 12. mars 2009 á midnátt.



## Stórt Chelsea-hall

Ein av visjónunum í Chelsea er, at felagið um fá ár skal verða fíggjarliga óheft av milliardahjálp frá ríka eigaranum, Roman Abramovich. Men tað gongst tó so sum so við hesum. Hallið í seinasta roknskaparári var ikki minni enn 542 krónur. Av hesum verður roknað við, at á leið 200 milliónir vórðu nýttar sum kompensatión til Avram Grant og José Mourinho, sum báðir fingu sekkin. Peter Kenyon, stjóri, sigur tó framvegis, at um tvey ár verður talan um avlop í roknskapinum.

# Má røkka ella støkka

**Bæði Tjaldur og Neistin hava gjørt sítt til at renna VB uppaftur. Sunnudagin eru tey bæði til próvtøku**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*Jakup@sosialurin.fo*

Við sigrinum hjá Neistanum móti VB mikukvøldið komu tær úr bláa havnarliðnum veruliga við aftur í kappingina um at røkka einum plássi í FM-finaluni. Ein kapping, har Neistin at kalla slettis ikki hevur verið við stóran part av árinum, og har tær av fleiri longu vóru avskrivaðar.

Gaman í eru krøvini til Neistan nakað størri, enn tey eru til hini bæði. Men kemur Neistin væl frá dystinum sunnudagin, standa tær í eini heilt góðari støðu, nú endaspurturin í kappingini veruliga er um at koma ígongd.

Tjaldur er hinvegin eisini í sera góðari støðu. Sigurin hjá Neistanum kom serstakliga væl við hjá runavíkingunum, sum eisini hava ein dyst til góðar í mun til VB og Neistan.

Hinvegin er Tjaldur nú nakað skert av skaðanum, sum Annika Thomsen fekk í steypafinaluni, men fyri tað kann væl vera, at styrkin hjá teimum í løtuni er ov stór til Neistan.

Og so kann leggjast afturat, at tær báðar fyrru ferðirnar, at Tjaldur og Neistin hava spælt, hevur úrslitið verið javnleikur, so tað eru helst allar góðar orsøkir at rokna við einum jøvnum dysti aftur hesaferð.

Í hinum báðum dystunum eru favoritt-leiklutirnir rættiliga greiðir. Stjørnan spælir aftur hesaferð í Havn, og móti Kyndli er lítil ivi um, at stigini fara við norðureftir. Nakað sum ikki akkurát liggur í kortunum, tá VB í Vági hevur heimavøll móti StÍF.



*Higar til hava Tjaldur og Neistin spælt tveir javnleikir sínamillum. Ein møguligur vinnari sunnudagin stendur við sera góðum kortum, nú endaspurturin um FM-finaluplássini av álvara er farin ígongd*

**Hondbóltur**

**Sunset-kappingin**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Stjørnan | 14 | 11 | - | 1 | - | 2 | 367 | 287 | 80 | 21 |
| 2 VB | 13 | 9 | - | 0 | - | 4 | 359 | 293 | 66 | 18 |
| 3 Tjaldur | 13 | 7 | - | 3 | - | 3 | 352 | 314 | 38 | 18 |
| 4 Neistin | 13 | 6 | - | 2 | - | 4 | 326 | 306 | 20 | 15 |
| 5 StÍF | 14 | 3 | - | 0 | - | 11 | 342 | 409 | -67 | 6 |
| 6 Kyndil | 13 | 0 | - | 0 | - | 13 | 224 | 361 | -137 | 0 |

**Atlantic Airways-kappingin**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 VÍF | 13 | 11 | - | 0 | - | 2 | 361 | 331 | 23 | 22 |
| 2 H71 | 14 | 8 | - | 0 | - | 6 | 371 | 329 | 42 | 16 |
| 3 Neistin | 13 | 8 | - | 0 | - | 5 | 380 | 368 | 12 | 16 |
| 4 StÍF | 14 | 6 | - | 2 | - | 6 | 345 | 336 | 9 | 14 |
| 5 Kyndil | 14 | 4 | - | 2 | - | 8 | 340 | 371 | -31 | 10 |
| 6 KÍF | 14 | 2 | - | 0 | - | 12 | 327 | 389 | -62 | 4 |

## Kapprenningin heldur fram

**Hvørki H71 ella Neistin hava ráð at kiksa, tá tey sunnudagin spæla móti ávikavist StÍF og KÍF**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Eftir finaluvikuskiftið seinast er talan nú aftur um vanligan arbeiðsdag hjá hondbóltsfeløgunum kring landið.

Hjá nýkosnu steypavinnarunum úr Neistanum er setningurin at fáa beinini niður at jørðini skjótast gjørligt. Tað kann væl vera, at Neistin á pappírinum hevur sterkasta liðið í landinum, og at KÍF á talvuni er niðast. Men veruleikin hevur sam-stundis víst, at kollfirðingar kunnu argað øll hini liðini, og júst í steypakappingini hóttu teir eitt skifti við, at finaluplássið hjá Neistanum skuldi verða av ongum.

Í Havn verður klassikarin millum Kyndil og VÍF á skránni. Og tó at VÍF í ár hevur víst seg at vera væl sterkari enn arvafíggindarnir, so hevur Kyndil ment seg heilt nógv. Og eingin ivi er um, at júst hesin dyst-urin er ein, sum teir heldur enn fegnir vilja vinna.

Seinasti dysturin er í Hoyvíkarhøllini, har H71 tekur móti StÍF. Og aftur her er talan um uppgerð, sum væl kann arga nakað nógv meira, enn favorittarnir brýggja seg um. Samstundis hava gestirnir úr StÍF eisini sítt at spæla fyri, tí við eini góðari røð kunnu teir lættliga blanda seg heilt alvorliga í dystin um at røkka øðrum finaluplássinum. Hoyvíkingar hava hinvegin ikki ráð at missa nakað í sínum lagi, og tí er væntandi, at talan verður um dyst við høgum intensiteti.



*Okkum eydnaðist ikki at fáa viðmerking frá Heðini Askham, men alt bendir á, at samstarvið millum hann og B36 nú er endað*

# Heðin steðgar í B36

**Alt bendir á, at B36 skal leita sær eftir nýggjum venjara til Formula-liðið hjá felagnum**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

B36 tykist í løtuni at standa uttan venjara til Formula-liðið.

Fyrsta partin av fyrireikingunum til komandi kappingarár hevur Heðin Askham staðið fyri venjingunum, og tað varð roknað við, at Heðin eisini skuldi halda fram í sessinum, sum hann setti seg í fjør. Og har tey flestu vóru á einum máli um, at hann framdi eitt serstakliga gott arbeiði.

Sum skilst hava partarnir tó ikki rokkið nakrari semju, nú tosað hevur verið um nýggjan sáttmála, og tí er í løtuni óvist, hvør verður venjari hjá Formula-liðnum hjá B36 í 2009.